# Skatturin hækkar í Klaksvík

**Skattaprosentið komandi ár hækkar við 1, 25 % og eitt lán upp á tíggju milliónir skal takast. Hinvegin hækkar barnafrádrátturin úr 3.500 upp í 4.000 krónur. Hetta er nakað av tí, sum Klaksvíkar býráð samtykti á býráðsfundi týskvøldið**

BÝRÁÐSFUNDUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Skattaprosentið í Klaksvíkar kommunu verður 20,25 % komandi ár. Sostatt hækkar skatturin við 1,25 %. Tosað varð annars um undan býráðsfundinum, at skattaprosentið skuldi hækkast við tveimum prosentum, men so varð kortini ikki.



*Nú verður lagt upp fyri verri tíðum í Klaksvík. Inntøkurnar í ár verða heldur lægri enn væntað, íløgur í sambandi við Norðoyatunnilin og fleiri øki hjá kommununi at umsita eru nakrar av orsøkunum til, at skattaprosentið komandi ár hækkar við 1,25 prosentum*

Eisini varð samtykt at taka eitt lán upp á 10 milliónir. Hetta lánið skal fíggja serætlanir í sambandi við tær mongu íløgurnar, sum kommunan hevur gjørt og er í ferð við at gera nú undirsjóvartunnilin er í gerð.

Hinvegin hevur kommunan lagt upp fyri barnafamiljunum. Barnafrádrátturin í kommununi hækkar úr 3.500 upp í 4.000 krónur fyri hvørt barnið komandi ár.

Aðrar sparingar hava eisini verið neyðugar, og alt hetta kemur, sambært Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóra, av, at inntøkurnar hjá kommununi ikki verða so høgar, sum roknað var við og tí at landið leggur alt meira út til kommunurnar at umsita.

Steinbjørn Jacobsen greiðir frá, at eftir seinasta býráðsfund móttók kommunan nakrar framrokningar frá Toll og Skatt, har tað greitt vísti, at inntøkurnar í ár fóru at verða um fimm milliónir lægri enn væntað varð fyrr í ár.

– Tá landið lækkar skattin, missa kommunurnar altíð inntøku, vit hava fingið framrokningar, sum frammanundan hesum skattalættanum vísa, at inntøkurnar verða lægri og hartil verður meira og meira lagt út til kommunurnar at umsita. Alt hetta kostar pengar, sigur Steinbjørn Jacobsen og heldur fram, at hann beint eftir seinasta býráðsfund segði, at inntøkurnar helst fóru at lækka og tískil álegði hann nevndunum at spara á øllum økjum. Hetta var fyri einum mánaði síðani.

Steinbjørn heldur ikki, at hetta kemur sum nøkur nýggjheitsbumba. Hann vísir á, at hann fleiri ferðir fyrr í ár hevur greitt frá í fjølmiðlunum, at um íløgur í sambandi við tunnilin skuldu gerast, so máttu hesar fíggjast við lántøku ella skattahækking – ella báðum.

# Nýggja Vísindasiðsemisnevndin sett

**Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevur nú sett Vísindasiðsemisnevndina av nýggjum**

Í Vísindasiðsemisnevndini skulu vera 7 limir, og limirnir eru nú júst vorðnir útskiftir. Landsstýrismaðurin hevur sett nevndina av nýggjum.

Tey, ið nú manna Vísindasiðsemisnevndina, eru Inga Poulsen Dam, sóknarprestur, Sonni Smith, tíðindamaður, Malena Arnholdsdóttir, forkvinna í Javna, og Kári Mortensen, studentaskúlalærari.

Hesar fýra nevndarlimirnar hevur landsstýrismaðurin sjálvur valt.

Læknafelag Føroya hevur eisini valt tríggjar limir. Teir eru Fróði Joensen, yvirlækni, Gunnhild Isfeldt, lækni og Dorrit Joensen, lækni.

Varalimir eru Marjun Bæk, sóknarprestur, Jan Jespersen, yvirlækni og Dánjal Højgaard, tíðindamaður.

Nevndin fer at skipa seg sjálv og velja formann og næstformann.

## Uppgávur hjá nevndini

Vísindasiðsemisnevndin hevur til uppgávu at gera metingar um granskingarverkætlanir, sum fevna um og byggja á royndir við menniskjum og við arvaílegum.

Metingarnar hjá nevndini skulu fyrst og fremst tryggja, at tey menniskju, sum taka lut í verkætlanunum, verða vard.

Harumframt skulu metingarnar tryggja, at endamálið og framferðarhátturin í verkætlanunum eru í samsvari við vísindalig krøv.

Áðrenn farið verður í holt við eina biomedisinska granskingarverkætlan, skal Vísindasiðsemisnevndin gera meting av hesi ætlan og geva loyvi til, at hon kann byrja.

Lógargrundarlagið undir Vísindasiðsemisnevndini er at finna í fyriskipan nr. 862 frá 30. november 1999.

**eys**

# Skemt 04 útkomin




Tann 16. bókin í røðini av Skemtbókum við tekningum eftir Óla Petersen er útkomin. Bókin "Skemt 04" er um 160 blaðsíður og fevnir um tekningar, sum hava verið á baskíðuni í Sosialinum hetta seinasta árið. Í hesum tekningum viðger listarmaðurin mong av dagsins málum, sum hava sett sín dám á hetta tíðarskeiðið.

Bókin er sett, umbrotin og prentað hjá Føroyaprent og kostar 150 kr.

# Nýggj ellinja millum Sund og Skálabotn

**Størri trygd skal fáa í el-veitingina**

ORKA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Einki er so strævið, sum tá streymurin brádliga fer. Men hetta kann, og hetta ætlar SEV at gera nakað við.

Tað hendir tíbetur ikki so ofta at streymslit er, og tá tey so endiliga eru, gongur sjáldan long tíð til viðurskiftini eru í lagi aftur.

Men í SEV eru tey altíð uppá vakt fyri at tryggja øllum húskjum í landinum ein regluligan og eisini bíligan streym. Og tá hugt verður eftir fíggjarætlanini hjá SEV fyri 2005 sæst, at hon eisini leggur upp til tað sama.

## Útbyggja

Komandi ár verður tí eisini lagdur dentur á at menna og útbyggja elkervið. Hetta verður gjørt fyri at økja um veitingartrygdina og møguleikunum fyri størri fleksibiliteti í rakstrinum.

Sum ein part av hesum málsetningi ætlar SEV at leggja - ella byggja, sum teir siga - eina nøggja 60 kV linju millum elverkið á Sundi og Skálabotn.

Hetta arbeiðið er í roynd og veru longu farið í gongd, og gongur arbeiðið sum tað skal. Mett verður tí, at henda linjan kann takast í nýtslu seint komandi ár. Samstundis verða fleiri av teimum 40 ára gomlu transformarunum skiftir út.

Í sambandi við nýggja háspenningarkaðalin millum Sundsverkið og Skálabotn hevur Fjarhitafelagið ætlanir um at leggja eina fjarhitaleiðing millum Sundsverkið og Sandvíkahjalla. Hetta verður gjørt fyri at kunna gagnnýta avlopshitan frá motorunum á Sundi til eina fjarhitaskipan í Hoyvíkshaganum.